BARNA- OG ÚTBÚVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Sumbiar skúla

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum**

Tíðaravmarkað starv skúlaárið 2023-24 sum fyrstilærari í Sumbiar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2023. Í skúlanum eru 35 næmingar í 1. – 7. flokki, og tríggir lærarar umframt skúlaleiðaran starvast í skúlanum.

**Um starvið**

Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Hann skal virka fyri, at næmingar og lærarar trívast, skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim og í samstarvi við foreldrini virka fyri, at næmingarnir fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

Harumframt skal fyrstilærarin vera førur fyri at skipa eina mennandi starvsfólkaleiðslu, skapa umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning. Eisini skal fyrstilærarin skapa virðing fyri skúlanum og leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava

- Lærarautbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum
- Leiðsluroyndir og antin hava ella fara undir skeið innan leiðslu
- Førleika at taka neyðugar avgerðir, at virka fyri trivnaði og einum mennandi læriumhvørvi
- Førleika at orða seg á góðum føroyskum máli

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Sumbiar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokki 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av lærarauprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **22. mai 2023.**

**Umsóknin verður stílað til:**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: bumr@bumr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, eru vælkomin at ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking* barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. *Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*.